# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
NIELS PETERSEN
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

SÍ-TB 3-0 (25-19, 25-13, 25-16)

## SÍ gjørdi bart

**TB megnaði at halda tørn í teir fyrstu bóltarnar í hvørjum setti, men so drógu sørvágskvinnur frá tvørákvinnum og vunnu settið, hetta var gongdin í øllum settunum, hóast TB royndi at svara aftur, men tað gekk striltið**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*




*savnsmynd*

Sørvágskvinnur í SÍ hava av sonnum fingið ferð undir vengurnar. Tær eru nú komnar uppá átta stig og eru vælspælandi fyri tíðina. Tað eru tó enn eitt vet upp til oddaliðið úr fuglafirði, ÍF.

### SÍ var betur

Tað tók umleið ein góðan tíma at avgreiða dystin í meistaradeildini hjá kvinnum sunnudagin.

Tað stóð javnt á, teir fyrstu bóltarnar, men so heldur ikki meira enn tað. Unga TB-liðið stóðu ikki SÍ mát í dag og máttu tessvegna taka til takkar við ósigri.

SÍ eru komnar uppá átta stig, fyri fimm dystir, og eru tað tvey stig færri enn oddaliðið ÍF, fyri somu mongd av dystum. So ikki kann sigast annað enn at tætt er í toppinum. Og skuldi annað liðið snávað, so er skjótt hjá einum øðrum at síkja seg upp ímillum, og blandað seg í toppstríðið. Livst so spyrst.

### TB tapa aftur

TB kvinnur tapa sín fjórða dyst í kappingini, og tær hava fýra stig, eftir seks dystum. Tær hava frí í næsta vikuskifti, so tær fáa longri tíð at fyrireika seg til dystin móti Mjølni í Klaksvík um fjúrtan dagar. Har ætla tvørákvinnur sær at vinna, hoyrist av Tvøroyri. –Vit vilja venda trilvandi gongdini og ynskja at leggja sjógv ímillum okkum og botnin, sigur Katrin Petersen, ein av álitisleikarunum á unga TB-liðnum.

KÍF-ÍF 1-3 (22-25, 17-25, 25-20, 17-25)
Mjølnir-ÍF 1-3 (16-25, 19-25, 26-24, 24-26)

## Tvær ferðir 3-1

**At ÍF eigur góðar flogbóltsleikarar á kvinnusíðuni, er ongin ivi um, tí tær liggja greitt á odda og eru ósigraðar eftir fimm dystum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Innan fáar dagar hava ÍF-kvinnurnar megnað at vunnið tveir truplar útisigrar, báðar við settúrslitunum 1-3. Tann fyrri var í Kollafirði, móti KÍF og tann seinni var í gjárkvøldið í nýggju høllini í Klaksvík, móti Mjølni.

### KÍF á triðja plássi

Við ósigrinum í vikuskiftinum móti ÍF, megnaðu tær úr Kollafirði ikki at leggja sjógv millum seg og vágaliðið Drátt. Liðini liggja nú bæði á seks stigum, og kappingin harðnar um plássini, nú flestu liðini hava fingið spælt nakrar dystir.

### Tap á nýggjum undirlagi

Hóast Klaksvíkskvinnur hava fingið nýggja glæsuliga høll at spæla sínar dystir í, megnaðu tær ikki at koma á stigatalvuna heldur hesa ferð. Hetta er teirra fjórði dystur, og enn hava tær onki stig vunnið sær, eins og Fleyr, ið liggur á síðsta plássinum í Meistara deildini. Mánadagin tóku Mjølnir móti ÍF, og eisini úr Klaksvík megnaðu ÍF at vinna. Úrslitið varð, fyri aðru ferð innan fáar dagar, 3-1 til kvinnurnar úr Fuglafirði.




Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-12, 25-16, 25-22)

## Mjølnir hevur munin

**Annað vikuskiftið á rað noyðast havnamennirnar at lúta fyri Klaksvíkingunum, ið aftur hesa ferð vunnu tryggan 3-0 sigur**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fleyr hevur tað trupult í meistaradeildini í ár. Teir hava spælt fimm dystir í ár og hava tapt teir allar. Næstur teimum eru hitt havnarliðið, Fram, við tveimum stigum, tí við sigrinum í gjár háláðu Mjølnir seg uppá fýra stig, ið er ájavnt ÍF, men tó við einum dysti meira enn fuglfirðingar.

### Sjónligari munur

Í Havn var Mjølnir nógv tað besta av liðunum, og somuleiðis var støðan í Klaksvík. Munurin var kanska enn meira sjónligur, í øllum førum um man hyggur at støðunum í hvørjum einstøkum setti.

### Kappingin harðnar

SÍ er á odda í Meistaradeildini hjá monnum, men teir hava spælt tveir dystir fleiri enn Mjølnir og tríggjar fleiri enn ÍF, so tá allir írestandi dystirnar eru spældir, fæst óivað nærri ábendingar um, hvussu støðan møguliga fer at laga seg í bestu flogbóltsdeildini hjá monnum.

SÍ-Fram 3-0 (25-22, 25-15, 25-21)

## Gongur væl hjá SÍ

**Ikki kann sigast annað enn at tað gongur væl hjá flogbóltinum í Sørvági. Ikki bara kvinnurnar visa styrki, men so sannuliga eisini mennirnar, ið liggja á odda, hóast teir hava spælt fleiri dystir enn liðið á øðrum plássi, ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Sørvingar høvdu vitjan av Fram, úr Havn, og havnamenn sluppu avstað aftur, sum teir komu, við ongum. Tað var SÍ, ið setti dagskránna í Sørvági, og gjørdu teir tað eisini so sannførandi, sum at vinna greiðan 3-0 sigur.

### Ongin ivi

Havnamenn royndu at bíta frá sær, men lítið batti, tí SÍ vóru teir neyvaru, og fóru eisini við stigunum, sum prógv um tað. Fyrsta sett var hampuliga javnt, og endaði tað eisini 25-22, men hini bæði settini, ið tá írestaðu, vóru ikki líka jøvn. SÍ vann tey bæði við ávíkavist 25-15 og 25-21.